HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur 18. november 2021 kl. 16.30 – 18.30

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila Í. Hentze, Gunnvør Balle, Leivur Simonsen, Hans Jón Thomsen og Jens á Skipagøtu.

Avboð: Kristianna W. Poulsen

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir

Skrivari: Jens á Skipagøtu

Skrá:

1. **Vælkomin og góðkenning av fundarfrásøgn.**
   Fundarfrágreiðingin av skúlastýrisfundi hósdagin 8. apríl var góðkend.

2. **Landsroyndarúrslit í 4. og 6. flokki og skrivlig prótvøkuúrslit í 9. flokki.**
   Hans Jón Thomsen leggur fram landsroyndarúrslitini í Hoyvíkar skúla í 4. og 6. flokki í 2016, 2019, 2020 og 2021 og skrivlig prótvøkuúrslit í 9. flokki í 2019, 2020 og 2021.

3. **Úrslit av trivnaðarkanning skúlaárið 2018/2019.**
   Hans Jón Thomsen leggur fram úrslit av trivnaðarkanning, ið Mentamálaráðið lat gera skúlaárið 2018/2019.

4. **Kirkjugarðsleiðin og umbygging av Hoyvíkar skúla.**
   Tórshavnar býráð hevur samtykt, at ein kirkjugarsleið skal gerast frá Hoyvíkar kirkju og niðan í kirkjugarðin. Hoyvíkar skúli hevur fingið fráboðan um, at kirkjugarðsleiðin skal ganga framvið skúlanum, yvir til Hoyvíkshøllina og síðani niðan gjøgnum Dalin langa.
   Skúlastýrið er samt um at senda skriv skriv til Trivnaðarnevndina um kirkjugarðsleiðina og hvørjar forðingar hetta møguliga fær á eina dagføring og útbygging av Hoyvíkar skúla. Eisini vil skúlastýrið spyrja inn til heildarætlanina fyri felagsøkið við Hoyvíkar skúla og Hoyvíkar kirkju.

Rannvá Mortansdóttir ger eitt uppskot til skriv, ið verður sent skúlastýrislimunum til hoyringar, áðrenn skrivið verður sent Trivnaðarnevndini.

5. **Snøklar: Vesini í "Stóra skúla" og brúsurnar í fimleikarhøllini.**

   Vesini í "Stóra skúla" skuldu verið umvæld og nýtímansgjørd í summarfrítíðini 2021, men enn er einki blivið gjørt.

   Hans Jón Thomsen setur seg í samband við Jóhan Syderbø, nýggjur leiðari á Bygningsdeildini hjá Tórshavnar kommunu, fyri at fáa greiðu á hesum máli.

   Hans Jón Thomsen setur seg eisini í samband við Bygningsdeildina fyri enn einaferð at gera vart við, at brúsuviðurskiftini í fimleikarhøllini ikki eru nøktandi.

6. **Skipan av komandi fundum skúlaárið 2021/2022.**

   Frameftir verða skúlastýrisfundir lagdir fyrsta hósdag í hvørjum mánaði. Tó verða eingir fundir í januar og juni 2022.

   Komandi skúlastýrisfundir:

   - Hósdagin, 2. desember 2022
   - Hósdagin, 3. februar 2022
   - Hósdagin, 3. mars 2022
   - Hósdagin, 7. apríl 2022
   - Hósdagin, 5. mai 2022

7. **Ymiskt:**

   Mentamáladeildin hevur sent skúlunum eitt skriv og yvirlit yvir nýggj upptøkuøkir fyri fólkaskúlarnar í kommununi.

   Kunnað verður um skrivið og yvirlitið á næst komandi skúlastýrisfundi.

Fundurin lokin kl. 18:30.